# Kortanei til tríggjar ferðir so dýran tunnil

**- Eg havi sagt, at tað er púra burtur við at byggja ein tunnil eftir sløttum niðri í Leirvíkar bygd, sum kanska fer at kosta einar 100 miljónir krónur meira, enn ein vegur oman fyri bygdina kostar, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum**

LEIRVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, hevur lagt fyri løgtingið uppskot um at leingja freistina til framløgu av verklagslógini um vegaføringina í Leirvík í sambandi við Norðoyatunnilin. Orsøkin til umbønina um útseting er, at uppskotið um veg og lokrennu niðri í bygdini í Leirvík skal kannast nærri.

Á vælmøttum borgarafundi í Leirvík herfyri kom fram, at stórur meiriluti er millum bygdarfólkið fyri vegaloysn við lokrennu niðri í bygdini. Uppskotið hjá Landsverki við vegi oman fyri bygdina og niðan fyri bygdarhúsið fekk lutfalsliga lítla undirtøku.

Atkvøðugreiðslan millum leirvíkingar á borgarafundinum vísti, at 165 fólk vóru fyri vegi og lokrennu niðri í bygdini, 17 fyri vegi oman fyri bygdina – og 5 atkvøður vóru blankar.

### Púra burtur við

Seinastu dagarnar hevur ljóðað, at fíggjarmálaráðharrin, Bárður Nielsen, slett ikki er fyri at brúka nógv meira pening niðri í bygdini í Leirvík, enn loysnin oman fyri bygdina og niðan fyri bygdarhúsið hevði kostað.

- Eg havi sagt, at tað er púra burtur við at byggja ein tunnil eftir sløttum niðri í Leirvíkar bygd, sum kanska fer at kosta einar 100 miljónir krónur meira, enn ein vegur oman fyri bygdina kostar, sigur fíggjarmálaráðharrin avgjørdur.

Hann vísir á, at Landsverk sigur seg kunna fremja vegaloysnina oman fyri Leirvíkar bygd fyri góðar 40 mljónir krónur, meðan eingin við vissu veit, hvat vegaloysnin við lokrennu niðri í bygdini kemur at kosta. Tøl millum slakar 90 miljónir krónur og heilt upp í slakar 150 miljónir krónur hava verið frammi.

- Hetta merkir, at vegur og lokrenna niðri í bygdini kunnu koma at kosta einar tríggjar ferðir so nógv sum vegurin oman fyri bygdina.

Bárður Nielsen vísir á, at nú framløgan av verklagslógini um vegaføringina í Leirvík verður útsett, verður uppskotið, sum NCC saman við J & K Petersen eru komin við, kannað nærri.

### Meira "átiligt"

- Vísir tað seg, tá ið kanningarnar eru lidnar, at vegaføring við lokrennu kann fremjast fyri tað tvífalda av tí, sum vegurin oman fyri bygdina kostar, sær hetta hóast alt eitt sindur meira "átiligt" út, sum hann tekur til.

Bárður Nielsen heldur tó, at ein vegaføring oman fyri bygdina er ein góð loysn fyri leirvíkingar, og hann heldur tað ikki vera skilagott landsbúskarliga at brúka meira pening enn neyðugt til loysn av hesi vegaføring.

- Fáa leirvíkingar veg við lokrennu á sløttum, sum í minsta lagi verður tvífalt so dýrt sum ein vegaloysn oman fyri bygdina, kunnu vit vænta, at trýstið aðrastaðni fer at veksa.

Hann vísir á, at nógvastaðni kring landið er nógv ferðsla, og tað er ikki allastaðni, at vegirnir eru útbygdir samsvarandi ferðsluni.

- Hava vit fyrst givið eftir og samtykt eina nógv dýrari loysn enn hana, sum annars kann loysa málið á ein sømiligan og forsvarligan hátt, kunnu vit vænta, at aðrar kommunur fara at seta somu krøv.

### Órógvandi elementir

Bárður Nielsen heldur, at verkætlanin við vegi og lokrennu tykir honum heldur "vill", sum hann tekur til.

- Eg havi einki ímóti, at neyvari kanningar verða gjørdar av uppskotinum hjá NCC og J & K Petersen, men sjálvt um henda verkætlan sær út til at kunna fremjast fyri "bert" 50 miljónir krónur meira enn vegaføringing oman fyri bygdina í Leirvík, haldi eg avgjørt, at vit eiga at halda okkum til bíligaru loysnina.

Landsstýrismaðurin endurtekur, at tað eru ov nógv órógvandi "elementir" í fjøruloysnini við lokrennu, og í hesum sambandi hugsar hann serliga um "kavabóltin", sum hann heldur rættiliga kann fara á rull við eini slíkari verkætlan.

- Tað er løgtingið, sum tekur endaligu avgerðina – og alt eftir, hvørji tøl verða á borðinum til ta tíð, vóni eg, at løgtingið tekur eina ábyrgdarfulla avgerð, bæði búskaparliga og samferðsluliga.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum sigur, at landsstýrið hevur til uppgávu at arbeiða eftir ynskjunum hjá løgtinginum, og tí dugir hann ikki í løtuni at siga, hvat endaliga úrslitið verður.

- Eg eri í hvussu er ikki fyri at byggja veg og lokrennu á sløttum niðri í bygdini í Leirvík, sum kanska kemur at kosta tvær ella tríggjar ferðir so nógv sum ein vegur oman fyri bygdina, sigur Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri.



*- Fáa leirvíkingar veg við lokrennu á sløttum, sum í minsta lagi verður tvær ella tríggjar ferðir so kostnaðarmikið sum ein forsvarlig vegaloysn oman fyri bygdina, kunnu vit vænta, at trýstið aðrastaðni fer at veksa, sigur Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum*




*Kut úr uppskotinum um lokrennu hjá Teknistovuni í Gøtu*

# Samgongumenn fyri fjøruloysn við lokrennu

**Bæði Andreas Petersen, javnaðartingmaður og Alfred Olsen, sambandstingmaður, søgdu seg á borgarafundinum vilja stuðla leirvíkingum í málinum um vegagerð og lokrennu**

LEIRVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sum kunnugt mælir eitt samt bygdarráð í Leirvík til, at vegagerð við lokrennu verður loysnin upp á vegaføringina í sambandi við Norðoyatunnilin.

Á borgarafundinum søgdu fleiri politikarar, bæði í samgongu og í andstøðu, seg taka undir við loysnini, sum Leirvíkar bygdarráð og stórur partur av leirvíkingum mæla til.

### Flestu vóru fyri

Úr andstøðuni søgdu bæði sjálvstýrismaðurin, Kári P. Højgaard, miðflokkamaðurin, Bill Justinussen og tjóðveldismenninir, Karsten Hansen og Tórbjørn Jacobsen, seg taka undir við vegaloysnini við lokrennu.

Á hinari síðuni hildu fólkafloksmenninir, Kjartan Joensen og Jógvan á Lakjuni, at loysnin oman fyri bygdina og niðanfyri bygdarhúsið er meira ábyrgdarfull búskaparliga, tí hon eftir tølunum hjá Landsverki er nógv bíligari og eisini er forsvarlig ferðslutrygdarliga.

Eitt tað mest áhugaverda, var tað, sum samgongupolitikararnir, Andreas Petersen úr Javnaðarflokkinum og Alfred Olsen úr Sambandsflokkinum, søgdu.

Teir vóru nevniliga samdir um, at leirvíkingar eiga at fáa ta loysn, sum teir halda vera ta bestu – treytað av, at hendan ikki verður alt ov dýr at fremja í verki.

Andreas Petersen, løgtingsmaður, helt loysnina við vegaføring við lokrennu vera nógv ta skilabestu, og hann segði seg vilja arbeiða fyri, at Javnaðarflokkurin tekur undir við henni, um uppskotið hjá NCC og J & K Petersen upp á 87 miljónir krónur heldur.

Alfred Olsen segði eisini, at hann og Sambandsflokkurin taka undir við vegaloysnini við lokrennu, um verkætlanin kann fremjast fyri einar 80-90 miljónir krónur.

### Løgtingið avger

Vísandi til samrøðuna á hesi síðuni við Bárð Nielsen, er ikki vist, at tað verður so lætt hjá fíggjarmálaráðharranum og samgonguni at ganga uttan um einmæltu samtyktina hjá Leirvíkar bygdarráð - og breiða fólkaviljanum millum borgararnar í Leirvík.

Skulu vit taka javnaðarog sambandstingmenninar, Andreas Petersen og Alfred Olsen, fyri tað, teir søgdu á borgarafundinum, fara teir at gera sítt til, at leirvíkingar fáa ta loysn, teir ynskja sær.

Og ynskið hjá leirvíkingum er klokkuklárt; tað er vegagerð niðri í bygdini við lokrennu oman fyri havnalagið í Leirvík.